


## Danske Bank størri vinning

Tann størsti danski bankin, Danske Bank, missir framvegis nógvar pengar, men serfrøðingar siga, at bankin er komin á botn, og at hann fer at vinna meiri pengar í framtíðini. Greinarar hava sagt, at Danske Banbk fer ætlandi at missa einar 25 milliardir krónur upp á útlán í ár. Tá søgdu teir, at bankin fer at hava í mesta lagi 800 milliónir krónur í avlopi í ár, men nú siga teir, at avlopið verður 2,2 milliardir krónur, skrivar Jyllands-Posturin. Sambært greinarunum kann Danske Bank framvegis rokna við at missa nógvar pengar upp á tey privatu viðskiftafólkini orsakað av arbeiðsloysi og øðrum.

## Grønland fær barnaumboðsmann

Anda Uldum, sum umboðar flokkin Demokratarnar í tí nývalda grønlendska Landstinginum, segði í gjár, at hann fer at virka fyri, at Grønland fær ein barnaumboðsmann. Anda Uldum bleiv ikki valdur í Landstingið á valinum, men kemur á ting sum varamaður hjá Jens B. Frederiksen, sum verður landsstýrismaður. Anda Uldum segði við kringvarpið KNR, at hann fer at virka fyri einum lógarpakka til tey grønlendsku børnini, og at skipanin við einum barnaumboðsmanni verður ein partur av pakkanum. Uppgávan hjá umboðsmanninum verður at tryggja rættindini hjá børnum og ungum í Grønlandi. Svøríki hevur eina tílíka skipan.

# Satsa upp á at føroyingar skulu rýma av landinum

**Politikararnir hava lagt eina lúsa ætlan fyri, hvussu Føroyar skulu koma burtur úr kreppuni. Eftir mínum tykki, hava teir boðað frá einum politikki, har teir beinleiðis satsa upp á, at føroyingar skulu rýma av landinum og tað er tann største katastrofan av øllum, sigur Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur**

BÚSKAPARKREPPA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eftir mínum tykki, eru føroyskir politikararnir beinleiðis farnir at satsa upp á, at føroyingar skulu rýma av landinum.

- Og tað er ein lorta strategi!!!!

Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur og fyrrverandi formaður í Búskaparráðnum, heldur lítið um tær ætlanir, sum higartil hava verið frammi um, hvussu politikararnir ætla at stýra Føroyska samfelagnum ígjøgnum kreppuna, sum nú leikar á.

Hann sigur, at politikararnir í Føroyum gera akkurát tað øvugta av tí, sum teir áttu at gjørt.

Higartil hava vit ikki fingið nógv at vita um, hvørjar politiskar ætlanir, samgongan hevur lagt fyri ætlaða politikkin tey næstu árini fyri at koma okkum so snikkaleys burtur úr kreppuni, sum gjørligt.

Men vit hava í øllum førum fingið at vita, at yvirskipaða endamálið er, at hallið á fíggjarlógini skal vera burtur um 3-5 ár.

- Hetta eru fullkomiliga skeiv signal at senda almenninginum í eini kreppustøðu, sum hesari, sigur búskaparfrøðingurin.

Hann sigur, at útsøgnir, sum hesar, kunnu ikki føra ikki til annað enn at skapa ótta og stúran og eru við til at ræða fólk av landinum.

Og hann leggur afturat, at verður førdi politikkurin, soleiðis, sum landsins fremstu leiðarar hava fráboðað, fer tað at gera keppuna nógv djúpari, enn neyðugt.

Búskaparfrøðingurin sigur, at tað, sum fer at raka føroyska samfelagið harðast av øllum, er, vissi vit føra ein politikk, sum fer at reka fólk av landinum.

Tað, sum hendi í kreppuni í nítiárunum, var, at tað almenna skyldaði so nógv, at vit høvdu ongar møguleikar at læna.

Og tí bar ikki til hjá landinum at spenna seg út og brúka pengar fyri at forða fyri arbeiðsloysi og úrslitið var, at túsundtals føroyingar rýmdu av landinum.

- Avleiðingin av tí, er, at vit eru bara 49.000 fólk í Føroyum, men vit kundu verið 56.000 - 58.000 fólk.

Og tað hevur ómetaligar avleiðingar fyri føroyska samfelagið og føroyska vælferð, at vit eru 7.000-9.000 fólk færri at framleiða vørur og tænasturm eitt nú til tey eldru. Tann stóra vanlukkan er ikki, at vit ikki hava ráð til eftirlønir. Tann stóra vanlukkan er, at vit hava ikki nóg mikið av fólki til at røkta gomul og sjúk.

Hermann Oskarsson sigur, at eftir hansara tykki er politikkurin, sum nú er fráboðaður undir hesi kreppuni rætt og slætt kensluleysur.

- Hetta minnir um tann politikkin, sum vit vórðu tvingað at føra undir hinari kreppuni fyrst í nítiárunum, har løgmaður í veruleikanum onki fekk gjørt uttan at ynskja fólki, sum stungu í sekkin, góða ferð av landinum.

- Tað er ikki neyðugt í dag, men tað er tað, sum er fráboðað. Og eg haldi, at føroyskir politikarar svíkja borgaran við at sveiggja við spariknívinum í hesum, tíðum.

Nú vita vit ikki, hvat endaliga úrslitið verður, men bara tað, at signalini um sparingar verða send út, loysir tað ótta á fólk og órógvar nýtsluna og íløgurnar í landinum og tað er til stóran skaða, fyri ikki at tosa um hóttandi fráflyting.

### Hvør skal bera hallið?

Hermann Oskarsson sigur, at í eini kreppustøðu, sum hesari, er ongin ivi um, at vit koma at hava hall mótvegis umheiminum.

Tað einasta, sum spurningurin snýr seg um, er: Hvør skal bera hetta hallið, tí tað sigur seg sjálvt, at onkur skal jú hava tað.

Hann hevur hug at býta eitt samfelag sundur í trý: Privatu borgararnir, privata vinnulívið og teir almennu kassarnir.

- Privatu borgararnir hava sína avmáldu tíð á jørðini, so doyggja vit og so verður gjørt upp eftir okkum. Vinnulívið hugsar nøkur fá ár fram, í tíðina, kanska eini 20 ár fyri tær mest framrættaðu fyritøkurnar.

- Men almennu kassarnir eru her í allar ævir og tí er tað bara tað almenna, sum kann átaka sær skuld í allar ævir. Tað er bara tað almenna, sum kann átaka sær eitt hall og betala tað aftur yvir tey næstu 100 árini og tí hevur tað almenna eina heilt serliga støðu sum skuldari.

Fyri at sleingja eitt tal út, er tað einki í vegin fyri, at landskassin átekur sær eina skuld upp á eini 10% av bruttotjóðarúrtøkuni í eitt ella tvey ár, er tað ein skuld, sum, sum landið kann betala aftur tey næstu 20 árini ella longri.

- Men verða tað teir privatu borgararnir og privata vinnulívið, sum skulu átaka sær ein slíka skuld, verður tað ein rúgva, sum rýmir av landinum, tí tað fer at broyta teirra tilverugrundarlag so grundleggjandi við arbeiðsloysi og húsagangi.

Hann sigur, at hetta er tann boðskapurin, sum politikararnir í øllum øðrum londum senda sínum borgarum.

Sostatt er boðskapurin hjá politikarum í øðrum londum, at tað almenna er til reiðar at átaka sær eina skuld fyri at tryggja borgararnar.

Tí er tað, at politikararnir í øðrum londum royna at sissa sínar borgararar við boðskapinum um, at teir skulu kenna seg tryggar, tí tað almenna skal átaka sær tað neyðugu skuldina fyri at stýra ígjøgnum kreppuna.

Tað merkir í veruleikanum, at borgararnir sjálvir skulu betala tað – men bara yvir nógv longri tíð.

Hann sigur, at soleiðis er tað, at politikarar í øllum øðrum londum handfara eina kreppustøðu upp á.

### Púra skeivt

Hermann Oskarsson staðfestir, at í Føroyum gera politikararnir akkurát tað øvugta.

-Tær politisku útmeldingarnar vit hava fingið higartil, tað er neyðugt, at finna sparingar í landskassunum tey næstu árini.

- Vit hava fingið at vita, at hallið á fíggjarlógini skal vera burtur um 3-5 ár og at næsta ár skal hallið í øllum førum vera undir 500 milliónir.

- Tað er ein púra skeiv útsøgn at koma við í eini krepputíð, sum hesari. Ístaðin fyri at fráboða sparingar, áttu politikararnir at boða borgarunum frá, at teir skulu kenna seg púra tryggar, tí at landskassin er til reiðar at átaka sær so stóra skuld sum neyðugt fyri at halda arbeiðsloysinum niðri.

- Hetta er akkurát tíðin, tá ið politikararnir skulu gera seg út til at átaka sær skuld og at brúka pening skilagott so at so fá sum gjørligt verða arbeiðsloys.

Hann sigur, at tað er als ongin trupulleiki fyri almennu Føroyar at átaka sær eina skuld upp á einar tvær milliardir tey næstu fáu árini.

- Tað avgerðina hava føroyskir politikarar ikki verið nóg vaksnir til at taka, leggur Hermann Oskarsson afturat.

Ístaðin fyri koma teir við útsøgnum, sum elva til óttan og stúran og sum kann gera sítt til, at fólk fara at rýma av landinum.

Og tað er ein vanlukka av dimensjónum.

Hann spyr um politisku útsøgnirnar kunnu vera eitt úrslit av at tað er føroyskur hugburður, at vit skulu spara og onki skylda.

- Kanska eru vit so bygdaslig í heimssamfelagnum, at vit seta tað fremst av øllum at spara og onki skylda, hóast avleiðingin er, at arbeiðsloysið veksur og at byrðan hjá mongum verður so tung, at tey kanska rýma av landinum.

- Kanska duga vit at síggja avleiðingarnar av einum slíkum hugsunarhátti. Men so eiga politikararnir at ganga undan og vísa á tað røttu leiðina í eini støðu, sum hesari og rætta leiðin er ikki at spara.

Hann sigur, at sparingar fara sum ringar í vatninum. Koyrir tú minni í hýruvogni



*Tað, sum Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur ræðist mest, er, at politikararnir gera álvara av tí, teir hava hótt við seinastu mánaðirnar*

**Fyri hvønn einstakan er tað skilagott at spara. Men fara allir einstaklingar at spara, er tað ein vanlukka fyri samfelagið. Hermann Oskarsson sigur, at tað er akkurát tað, sum nú er hent, tí forbrúkið er nógv minkað. Tí er tað ikki fremsta skyldan hjá tí almenna at spara enn meir. Tvørturímóti skal tað almenna traðka í karakter og brúka pening fyri at forða fyri arbeiðsloysi og fyri at vekja álit millum borgarar**